UTTAN ÚR HEIMI

## Ivi um nýggjan mána

Ein sjálvlærdur amerikanskur stjørnufrøðingur vil vera við, at hann hevur funnið ein mána, sum stjørnufrøðingar ikki hava vitað um fyrr.

Tann nýggi mánin er lutfalsliga nær Jørðini. Hann hevur fingið heitið J002E2, og hildið verður, at hann er komin á okkara leiðir fyri stuttum.

Aðrir stjørnufrøðingar halda ikki, at talan er um ein mána. Á evropeiska rúmdargranskingarstovninum ESA verður sagt, at talan man heldur vera um eitt petti av einari av teimum stóru berirakettunum, sum amerikanarar nýttu til Apollo-ferðirnar til mánan.

## Geiðslavirkið skip

Myndugleikarnir í New York vildu ikki váða tað minsta, tá kanningar mikumorgunin avdúkaðu geiðslavirkni umborð á einum farmaskipi, sum lá við bryggju í býnum.

Bæði CIA og FBI høvdu ávarað um yvirgang á ársdegnum fyri atsóknirnar í fjør, og tí gjørdu myndugleikarnir alt fyri eitt av at toga farmaskipið til havs. Samstundis hildu menn fram at kanna farmin. Í gjár vóru kanningarnar ikki lidnar.

Sjónvarpið CNN sigur, at myndugleikarnir hava illgruna um, at skipið, sum er skrásett í Liberia, hevur bingjur, sum fyr hava verið nýttar til geiðslavirkið burturkast.

## Bush óður í høvdinum

Víðgongdir muslimar í Bretlandi hóttu mikudagin við øktum yvirgangi ímóti USA og amerikanskum málum.

Í moskuni í Finsbury í London segði ein av teimum víðgongdu talsmonnunum, at USA fekk als ikki nóg mikið tann 11. september í fjør, og at tað tí er neyðugt at halda fram, til amerikanarar verða lýdnir, sum hann tók til. Røðarin fanst hvassliga at George W. Bush, forseta og segði hann vera óðan í høvdinum.

Endamálið við fundinum í moskuni í Finsbury var at gera upp, hvat er komið burtur úr atsóknunum at USA fyri einum ári síðani.

## Norðmenn ímóti kríggi

Flestu norðmenn eru ímóti, at USA skal leypa á Irak.

Ein meiningakanning hjá Dagsavisen vísir, at 58 prosent eru ímóti amerikansku álopsætlanini. 22 prosent siga tað vera í lagi, at USA loypur á, og 20 prosent vita ikki, hvat tey skulu halda um ætlanina.

Kanningin vísir sambært granskarum, at norska fólkið hevur á leið somu hugsan sum fólk í øð_rum evropeiskum londum. M. a. hevur tað víst seg, at í ES-londunum er meiriluti ímóti, at Bush forseti skal gera álvara av ætlan síni.

# Al-Qaeda fyrireikar álop, sum verður verri enn World Trade Center

**Tað heldur ein av teimum fremstu serfrøðingunum í altjóða yvirgangi, sviin Magnus Ranstorp.**

YVIRGANGUR
*Árni Joensen:*



*Ground Zero í New York, har tey bæði tornini hjá World Trade Center stóðu. Atsóknin fyri einum ári síðani skelkaði allan heimin, men tað er væl hugsandi, at tann næsta atsóknin hjá al-Qaeda verður uppaftur verri.*

Magnus Ranstorp, sum starvast á lærda háskúlanum St. Andrews í Skotlandi, og sum verður mettur millum fremstu serfrøðingarnar innan altjóða yvirgang, ivast ikki í, at tiltøk hjá løgregluni í Evropa hava forðað fyri fleiri yvirgangsatsóknum hetta seinasta árið. Men hann ivast heldur ikki í, at vit fara at síggja fleiri atsóknir, og at tær verða verri enn tann í New York.

– Al-Qaeda fyrireikar minst eina sera umfatandi atsókn, sum helst verður í USA ella ímóti amerikanskum sendistovum. Nógv bendir á, at hetta verður uppaftur verri enn tað, sum hendi í New York og Washington, og at yvirgangsmenninir fara at nýta gass, biologisk evni ella kjarnorkuevni, sigur Magnus Ranstorp.

Samstundis fer al-Qaeda at skipa fyri morðum og burturflytingum við tí endamáli at fáa felagar latnar leysar úr fongslum ymsastaðni, og royndirnar vísa, at felagsskapurin fyrireikar altíð tvær ella tríggjar møguligar atsóknir.

Men sambært svenska serfrøðinginum er USA ikki tað einasta málið hjá al-Qaeda, og tað er væl hugsandi, at Evropa eisini fer at standa fyri skotum, sigur hann.

– Tað ringasta, sum vit kunnu ímynda okkum, er, at ein rænt flogfar verður stoytt niður í eitt kjarnorkuverk í Fraklandi ella Bretlandi. Tað kann elva til eina vanlukku, sum vit ikki hava sæð fyrr. Okkum nýtist bert at hugsa um, at í Tjernobyl var lítið kjarnorkuevni samanborið við eitt nú tað bretska Sellafield, sigur Magnus Ranstorp.

**Flogferðslan ikki trygg**

Hann ásannar, at sjálvt um munagóð framstig eru hend til tess at tryggja flogferðsluna, er flogferðslan framvegis ikki trygg. Eitt nú vísir hann á, at ferðafólk sleppa framvegis at hava sproytidunkar við sær umborð á flogfør, sjálvt um vit vita, at yvirgangsmenn fyrr hava nýtt flótandi spreingievni.

Síðani tann 11. september í fjør hevur Magnus Ranstorp havt úr at gera við at ráðgeva trygdartænastum, stjórnum og hernaðarligum leiðslum um framferðina hjá yvirgangsmonnum. Tríggjar tær fyrstu vikurnar eftir atsóknirnar í USA ringdi telefon hansara 3.000 ferðir, tí allastaðni vildu myndugleikar hava upplýsingar um møguligan vanda.

Hetta árið hevur hann lisið 25 vegleiðingar hjá al-Qaeda, sum vórðu funnar í Libanon. Ein teirra snýr seg um, hvussu tað ber til at pakka eina bumbu í geiðslavirki evni. Tá ein tílík bumba brestur, breiðir hon eitt skýggj av dusti, sum er lívshættisligt. Hetta er bert ein av vegleiðingunum.

# Svenskir politikarar avdúkaðir fyri rasismu

**Fleiri valevni til ríkisdagsvalið í Svøríki sunnudagin hava tikið seg av listanum, eftir at sjónvarpið hevur avdúkað, at tey hava rasistiskar hugsjónir.**

SVENSKA VALIÐ
*Árni Joensen:*

Alment fordøma allir politikararnir í Svøríki hugtakið rasismu, men við einum loyniligum upptøkutóli eydnaðist tað svenska sjónvarpinum at avdúka, at tá tann almenna mikrofonin er sløkt, er hugburðurin hjá fleiri politikarum ein annar.

M. a. avdúkaði tann loyniliga upptøkan varaformannin hjá flokkinum Moderatarna, Christer Ewe, sum á sjónbandinum segði, at muslimar duga bara til at seta børn í verðina og til at misnýta tær almennu skipaninar. Eitt annað valevni spurdi, hvør munurin er á einum svørtum og einari apu. Jú, svaraði politikarin sjálvur. Rættir tú teimum eina banan, tekur apan hana við fórinum. Tað er munurin. Eitt triðja valevni, sosialdemokraturin Ingemar Hulting, segði á sjónbandinum, at muslimarnir eru lívshættisligir. Tess fleiri sleppa til Svøríkis, tess størri verða landsins trupulleikar, legði hann afturat.

Síðani sjónvarpið almannakunngjørdi innihaldið í upptøkuni, hava fleiri valevni valt at taka seg at listanum til valið sunnudagin.

Gøran Persson, forsætisráðharri hevur eisini sagt, at tey valevni, sum hava slíkan hugsunarhátt, eiga at taka avleiðingarnar.



# Høvuðsstaðurin er settur upp á pláss

**Hóast Brøndby og FCK sigast at vera favorittar at vinna DM, so eru tað feløg aðra staðni frá enn úr danska høvuðsstaðnum, sum mynda toppin í superliguni**

SUPERLIGAN
*Jóannes Hansen*

Um Brøndby ikki fer at megna at endurvinna meistaraskapin, so verður FCK meistari. Soleiðis ljóðaði tað, tá tað fyri tveimum mánaðum síðani varð mett um, hvussu danska kappingin fór at tørna út.

Tað er væl hugsandi, at tað fer at venda soleiðis, tá øll 33 umførini verða fingin í frá hondini. Men eftir at sjeynda umfarið varð spælt mikukvøldið, vísir støðutalvan, at tað næstan er sum í táttinum, at tað, sum vendir niður, vendir upp. Fýra tey fremstu liðini eru úr Jyllandi og úr Odense, og FCK er ikki fremri enn á fimta plássinum.

Meistaraliðið úr Brøndby er eitt stig frá botnplássinum. Tað er púra óhoyrt, og um venjarin ikki hevði verið Michael Laudrup, sum er kanska tann mest avhildni av øllum í danska fótbóltsheiminum, so hevði sekkurin ivaleyst verið frammi í Brøndby.

Stóra stjórnan á Brøndby beinkinum ásannar, at tað hevur ikki hilnast so væl, men samstundis vísir hann á tað fantastiska, at hóast tað hevur roynst heilt illa hjá Brøndby, so eru teir á ongan hátt avskrivaðir í meistarastríðnum. Tað eru bara fimm stig upp til oddaliðið, og tað er einki at tosa um, tá tað framvegis eru 78 stig eftir at spæla um.

Brøndby var hesa ferð í Århus, har áhugin fyri AGF er so stórur nú, sum hann ikki hevur verið í fleiri ár. Omanfyri tjúgu túsund møttu upp at síggja liðið hjá avhildna venjaranum, Poul Hansen, sum hesa ferð hevði ein nýggjan stýrimann á miðvøllinum. Fyrrverandi landsliðsspælarin, Brian Steen Nielsen, er keyptur úr Malmö FF.

Lagið í Århus var av tí besta. Úrslitið var 2–2. Tað skulu teir á heimaliðnum kanska vera mest nøgdir við, men teir vóru á odda 2–1, inntil tað restaði eitt korter. Tá var Brøndby miðvallarin, Morten Wieghorst sera heppin. Við hælinum stýrdi hann frísparksinnleggi í málið. Ferðin, intensiteturin og harvið undirhaldsvirðið vóru høg alla tíðina, og einki er at ivast í, at áskoðarafjøldin í Århus framvegis fer at vera stór í heyst.

**Nýtt oddalið**

Undan sjeynda umfarinum var AaB oddalið. Teir vóru í Odense, og har eydnaðist tað heimaliðnum at vinna og harvið at trýsta AaB niður á næstfremsta plássið. OB vann 2–0, og teir vóru heppnir. Upp á nógvar mátar liktist dysturin honum, tá AaB fyri tíggju døgum síðani vann 3–0 á FCK.

Tá hevði FCK mesta spælið, men AaB skoraði málini. Hesa ferð hevði AaB mesta spælið, men tað var OB, sum skoraði málini. Teir staðfestu sigurin, tá AaB av øllum alvi stríddist fyri at javna.

Hjá OB eru avbjóðingarnar nógvar og stórar. Tað, sum er eftir av hesum mánaðinum, skulu teir spæla seks dystir. Teir skulu bæði spæla ímóti Brøndby og FCK, og so skulu teir í UEFA Cup hitta Celta Vigo.

Við sigrinum á FCK setti Esbjerg seg á triðja plássið. FCK hevði spælt 21 dystir upp í slag uttan at tapa. Nú hava teir tvær ferðir á rað tapt 3–0, og tað er merkisvert, at teir síðani síðst í apríl ikki hava megnað at hildið tætt. Málmunurin hjá teimum er minus tvey.

FCM vann fjórða plássið, tá teir á útivølli vunnu 3–2 á uppflytaraliðnum úr Køge, sum nú er aftast.

Viborg er næstniðast, og teir hava víst lítið higartil í hesum kappingarárinum. Spælið hjá Silkeborg hevur heldur ikki verið serliga merkt av íblástri. Tá hesi liðini hittust í Silkeborg var úrslitið 1–1. Skoðsmálið var, at eingin hevði uppiborið at vinna, og at hvørgin parturin yvirhøvur hevði uppiborið at fáa stig burturúr.

AB hevur havt tað truppult. Teir eru í fíggjarligum óføri, fleiri spælarar eru skaddir, og undan sjeynda umfarinum vóru teir niðast.

Gestirnir mikukvøldið vóru grannarnir úr Farum. Har er Christian Andersen venjari. Hetta var fyrsta vitjanin hjá honum í Gladsaxe, eftir at hann brádliga stakk av til FCK, har hann ikki gjørdist serliga gamalur. Farum venjarin var uppsettur uppá at vísa, at hann eigur eitt betri fótbóltslið, enn teir í AB gera, men tað eydnaðist ikki. AB skoraði í 8. og 14. minutti, og so var tað liðugt.

## Danska superligan

| | | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | AaB | 7 | 4 | - | 1 | - | 2 | 11 | 9 | 2 | 13 |
| 2 | OB (S) | 7 | 4 | - | 1 | - | 2 | 16 | 8 | 8 | 13 |
| 3 | Esbjerg | 7 | 3 | - | 2 | - | 2 | 17 | 14 | 3 | 11 |
| 4 | FCM | 7 | 3 | - | 2 | - | 2 | 12 | 10 | 2 | 11 |
| 5 | FCK | 7 | 3 | - | 2 | - | 2 | 11 | 13 | -2 | 11 |
| 6 | AGF | 7 | 2 | - | 3 | - | 2 | 11 | 11 | 0 | 9 |
| 7 | Farum | 7 | 3 | - | 0 | - | 4 | 10 | 13 | -3 | 9 |
| 8 | Brøndby (M) | 7 | 2 | - | 2 | - | 3 | 13 | 11 | 2 | 8 |
| 9 | Silkeborg | 7 | 2 | - | 2 | - | 3 | 8 | 9 | -1 | 8 |
| 10 | AB | 7 | 2 | - | 2 | - | 3 | 10 | 12 | -2 | 8 |
| 11 | Viborg | 7 | 1 | - | 4 | - | 2 | 10 | 14 | -4 | 7 |
| 12 | Køge | 7 | 2 | - | 1 | - | 4 | 12 | 17 | -5 | 7 |

Føroyskir leikarar: Todi Jónsson (FCK)

## Danska 1. deild

| | | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Ølstykke | 7 | 4 | - | 3 | - | 0 | 17 | 11 | 6 | 15 |
| 2 | Randers F. | 7 | 5 | - | 0 | - | 2 | 21 | 12 | 9 | 15 |
| 3 | Frem | 7 | 4 | - | 2 | - | 1 | 15 | 11 | 4 | 14 |
| 4 | Herfølge | 7 | 4 | - | 1 | - | 2 | 18 | 13 | 5 | 13 |
| 5 | B 1913 | 7 | 3 | - | 2 | - | 2 | 14 | 12 | 2 | 11 |
| 6 | Vejle | 7 | 3 | - | 2 | - | 2 | 9 | 8 | 1 | 11 |
| 7 | Fredericia | 7 | 3 | - | 2 | - | 2 | 10 | 10 | 0 | 11 |
| 8 | Brønshøj | 7 | 2 | - | 3 | - | 2 | 9 | 7 | 2 | 9 |
| 9 | HFK Sønderj. | 7 | 2 | - | 3 | - | 2 | 18 | 19 | -1 | 9 |
| 10 | Skjold | 7 | 2 | - | 2 | - | 3 | 9 | 9 | 0 | 8 |
| 11 | FC Aarhus | 7 | 2 | - | 1 | - | 4 | 12 | 13 | -1 | 7 |
| 12 | B93 | 6 | 2 | - | 1 | - | 3 | 8 | 9 | -1 | 7 |
| 13 | B 1909 | 7 | 1 | - | 3 | - | 3 | 12 | 16 | -4 | 6 |
| 14 | HIK | 7 | 2 | - | 0 | - | 5 | 5 | 12 | -7 | 6 |
| 15 | Hvidovre | 6 | 1 | - | 2 | - | 3 | 8 | 15 | -7 | 5 |
| 16 | AC Horsens | 7 | 0 | - | 3 | - | 4 | 8 | 16 | -8 | 3 |

Føroyskir leikarar: Christian Høgni Jacobsen (Vejle), Atli Gregersen (Randers Freja)

## Norska tippeligan

| | | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Rosenborg (M) | 21 | 14 | - | 3 | - | 4 | 44 | 25 | 19 | 45 |
| 2 | Lyn | 21 | 13 | - | 3 | - | 5 | 29 | 22 | 7 | 42 |
| 3 | Molde | 21 | 12 | - | 4 | - | 5 | 35 | 19 | 16 | 40 |
| 4 | Viking | 21 | 9 | - | 9 | - | 3 | 38 | 24 | 14 | 36 |
| 5 | Stabæk | 21 | 10 | - | 5 | - | 6 | 35 | 25 | 10 | 35 |
| 6 | Odd. Grenl. | 21 | 10 | - | 3 | - | 8 | 30 | 26 | 4 | 33 |
| 7 | Våleranga | 21 | 6 | - | 9 | - | 6 | 30 | 24 | 6 | 27 |
| 8 | Sogndal | 21 | 8 | - | 2 | - | 11 | 29 | 40 | -11 | 26 |
| 9 | Bodø/Glimt | 21 | 7 | - | 4 | - | 10 | 32 | 32 | 0 | 25 |
| 10 | Bryne | 21 | 7 | - | 4 | - | 10 | 33 | 35 | -2 | 25 |
| 11 | Brann | 21 | 7 | - | 3 | - | 11 | 29 | 39 | -10 | 24 |
| 12 | Lillestrøm | 21 | 6 | - | 5 | - | 10 | 26 | 28 | -2 | 23 |
| 13 | Moss | 21 | 4 | - | 5 | - | 12 | 22 | 38 | -16 | 17 |
| 14 | Start | 21 | 2 | - | 5 | - | 14 | 20 | 55 | -35 | 11 |

Føroyskir leikarar: Jákup Mikkelsen (Molde)



*Teir báðir favorittarnir til DM-heitið, FCK og Brøndby, mugu í løtuni finna seg í, at heili fýra av uttanbiggjaliðunum hava lagt seg framum í oddastríðnum*